

Linda Andrews var komin heim við bólki sínum, at framføra í heimlandinum Føroyum

Mynd: Niels Uni Dam

# Gospel í heimsflokki

**Linda Andrews og hennara ómetaliga væl spælandi bólkur vísti á Summarfestivalinum, hvussu Gospel skal spælast. Úr enda í annan var framførslan topp professionell**

UMMÆLI
*Niels Uni Dam*
*post@sosialurin.fo*



Fáar føroyskar songkvinnur munnu hava so nógvar og góðar royndir í útlondum sum Linda Andrews - Hetta nærum uttan at føroyingar hava varnast tað. Men á Summarfestivalinum var sera trupult at lata vera við at varnast Lindu, ið legði dent á, at Føroyar er hennara heim, ið hon er errin av, ikki minst, tá hon vísti Føroyar fram fyri sínum útlendsku tónleikavinum.

## Eg smeltaði

Við sær hevði Linda fýra føroyskar kórsangarar, ein føroyskan James á trummum og tríggjar fantastiskar útlendingar á gittara, bassi og keyboard. Bólkurin var so ótrúliga vælspælandi, at tónleikurin kýndi oyrunum. Soloir vóru leveraðar hegnisliga og við stórum kreativiteti. Bæði Linda og kórið sungu sum dreymar, og ljóðmaðurin gjørdi sítt til fulnar. Sjálvt ein svorðin R'n'B hatari sum eg smeltaði og bleiv rørdur av tónleikinum. Hetta kanska serliga tí Linda er ein gospel diva, ið ikki dettur í út-tambaðu R'n'B grøvina, í øllum førum ikki so ofta og ikki long pettu í senn. Løgini vóru eisini øgiliga væl arrangeraði, soleiðis at tað var áhugavert at lurta, at vøkur kór og góð balansa var millum instrumentini.

Løgini vóru í stóran mun av fløguni Relevation, ið Linda gav út herfyri. Gospel løg ið høvdu týdning fyri hana, tá hon var yngri. Eisini sluppu vit at hoyra, "Nú eg ásjón tína søki" av fløguni "Vit kunngera Jesus", ið man vera mest kenda hjá Lindu í Føroyum

## Star quality

Linda hevur nógvar royndir sum kórsangari og kórleiðari. Men tað er eitt stórt lop at skula vera oddakvinna í einum bólki, og her vóru ávísir veikleikar at síggja. Serliga tá tað snúði seg um útstráling og kropsmál. Hennara armasvingan og peikifingrar tyktust dekan ov ónátúrlig. Har var ikki tað kropsliga gruvið, ið ofta eyðkennir gospelsangarar. Eisini vóru hennara lítlu røður millum løgini margháttligar - pedagogiskar á ein løgnan hátt. Tú kendi ikki, at hetta var ein oddakvinna við stjørnudusti, sum tosaði við okkum, men kanska heldur ein pedagogur á eini tónleikaterapi workshop, eg veit ikki um hetta er gott ella ringt, men tað kendist løgið.